


# Krevja at norska stjórnin fær oljufólk í arbeiði aftur

**Jógvan Hugo Gardar**

18.11.2015 - 10:14

Oljan.fo

Tey flestu fakfeløgini sum eru umboðaði í norsku oljuvinnuni savnast í dag í Stavanger, har tey uttanfyri Oljusavnið fara at mava eitt átak fyri at royna at vekja borgarligu stjórnina, nú túsundtals fólk í oljuvinnuni og veitingarvinnuni hava mist arbeiði, ella eru hótt av uppsøgn.

Feløgini sum standa aftanfyri átakið eru DSO, El & IT Forbundet, Fellesforbundet, FLT, Industri Energi, Lederne, NITO, Norsk Sjømannsforbund og SAFE. Hesi umboða til samans 400.000 limir. Boðini til stjórnina eru stutt og greið:«Norge trenger oljeindustrien!».

Fakfeløgini krevja at stjórnin ger meir fyri at tryggja arbeiðsplássini í oljuvinnuni og ikki minst at tann kunnleikin sum oljufólk hava ikki hvørvur úr vinnuni. Kravið er at orkumálaráðharrin Tord Lien ger nakað við spurningin beinanvegin.

Higartil eru fleiri enn 25.000 størv horvin í norsku oljuvinnuni síðani oljuprísurin fór at lækka á sumri 2014.